Jóhannis Joensen
løgtingsmaður

Nr. 89/2019

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um ADHD, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a).

1. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv hava fingið staðfest ADHD í Føroyum býtt upp í útgreinað privat og útgreinað alment?
2. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu nógv hava fingið staðfest ADHD í Føroyum býtt eftir aldursbólkum (eldri og yngri enn 18 ár)?
3. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, hvussu long bíðitíðin til útgreining hjá vaksnum er í dag, og nær tað kann væntast, at bíðitíðin kemur niður á tríggjar mánaðir, sum er ynskiligt?
4. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, nær ADHD klinikkin eftir ætlan fer at virka?
5. Og ætlar landsstýrismaðurin at gera tað møguligt hjá fólki, sum hava fingið staðfest ADHD við privatari útgreining, at sleppa inn í heilsuskipanina og komandi ADHD klinikkina?

Viðmerkingar:
Bíðitíðin til ADHD-útgreining á psykiatriska deplinum hevur verið upp í 8 ár. Hetta hevur ført við sær, at nógv fólk í longri tíðarskeið hava latið seg útgreinað av privatum psykiatarum fyri egna rokning. Øll hesi fólk eru uttan fyri psykiatriina og skipanina undir henni. Tey fáa tí onga hjálp til at tillaga t.d. heiligvág ella fáa kognitivar viðgerðir. Heldur ikki fáa tey somu møguleikar til eftirkanningar, ráðgeving, kognitiva viðgerð v.m. eins og tey, sum eru útgreinað ígjøgnum landið, fáa. Ynskiligt hevði verið, at bíðitíðirnar til almenna útgreining vóru so stuttar, at tað ikki var neyðugt hjá fólki at rinda fyri at fáa privata útgreining. Meðan arbeitt verður við at stytta bíðitíðirnar, kann landsstýrismaðurin møguliga umhugsa at lata tey, sum eru útgreinað privat, verða fevnd av psykiatriini og hartilhoyrandi tænastum.
Og nú talan hevur verið um at stovnseta eina ADHD klinikk, hevði tað somuleiðis verið ynskiligt at fingið nærri at vita um hesar ætlanir. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 25. mai 2020

Jóhannis Joensen